HEILSUMÁLARÁÐIÐ

28. januar 2020
Mál: 17/00673-57
Viðgjørt: Rannvá Magnussen

**Løgtingsmál nr. xx/2020 Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar ”forskellige love om ændring af lov om klage- og erstatningsadgang inden for sundhedsvæsenet”**

**Uppskot**

**til**

**Ríkislógartilmæli**

**Um at seta í gildi fyri Føroyar ”forskellige love om ændring af lov om klage- og erstatningsadgang inden for sundhedsvæsenet”**

Mælt verður ríkismyndugleikunum til at seta í gildi fyri Føroyar hjálagda uppskot (skjal 1) til kongliga fyriskipan um ”ikrafttræden for Færøerne af forskellige love om ændring af lov om klage- og erstatningsadgang inden for sundhedsvæsenet”.

## Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsøkir til uppskotið
Neyðugt er at dagføra galdandi reglur í Føroyum um kæru og endurgjaldsrættin innan heilsuverkið, soleiðis at tað verður samsvar millum lóggávuna, ið er galdandi í Danmark og lóggávuna, ið er galdandi í Føroyum.

### 1.2. Galdandi lóggáva
Rætturin hjá borgarum at kæra um og fáa endurgjald fyri skaða av viðgerð fingin í føroyska heilsuverkinum umframt frá løggildum heilsustarvsfólkum, sum virka í Føroyum, uttan at hava tilknýti til heilsuverkið, er staðfestur og skipaður í kongligari fyriskipan nr. 1248 af 19. december 2011 “om ikrafttræden for Færøerne af lov om klage- og erstatningsadgang inden for sundhedsvæsenet”.

Síðani kongliga fyriskipanin kom í gildi, hevur Fólkatingið samtykt 15 broytingarlógir, sum við kongligari fyriskipan kunnu setast í gildi í Føroyum. Talan er tilsamans um 88 einstakar broytingar í mun til galdandi lóg í Føroyum.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**
Endamálið við uppskotinum er at betra um rættindini hjá føroyingum, soleiðis at føroyingar hava somu rættindi at kæra og fáa endurgjald í sambandi við viðgerð í føroyska heilsuverkinum.

**1.4. Samandráttur av uppskotinum**
Ein stórur partur av broytingunum eru tekniskar broytingar og konsekvensbroytingar, sum t.d. snúgva seg um, at myndugleikar broyta navn, verða lagdir saman og at ábyrgdarbýti millum myndugleikar verður broytt (til dømis hevur Patientombuddet broytt navn til Styrelsen for Patientklager). Talan er um myndugleikarnar, sum umsita lov om klage- og erstatningsadgang, uttan mun til um tann í Føroyum galdandi lógin verður broytt ella ikki.

Ein týðandi broyting við dagføringini er, at tilvísingar verða gjørdar til "den for Færøerne gældende sundhedslov". Hesar tilvísingar vóru ikki møguligar tá lógin upprunaliga kom í gildi í Føroyum, tí tá var sundhedsloven ikki galdandi her.

Mest týðandi broytingarnar eru kanska:
- Doyggja børn áðrenn tey eru fylt 18 ár ella eru deyðfødd eftir 22. viðgonguviku í sambandi við skaða, sum er fevndur av lógini, hava foreldur rætt til endurgjald á 162.000 kr. Um foreldrini hava felags foreldramyndugleika, verður upphæddin býtt javnt millum foreldrini.
- Nýggjar reglur um, at áheitanir frá Patienterstatningen um at fáa útflýggja skjalatilfar frá sjúkrahúsum og øðrum, sum kunnu hava endurgjaldsskyldu mótvegis sjúklingum sambært lógini, og frá øðrum viðkomandi myndugleikum, skulu svarast innan 30 dagar. Ber hetta ikki til, skal frágreiðing sendast til Patienterstatningen.
- Útgoldin endurgjøld, móttikin í góðari trúgv, verða friðað, soleiðis at tey ikki kunnu verða kravd afturgoldin, um avgerðin í einum málið broytist í sambandi við kærumálsviðgerð.
- Heilsumyndugleikin fær álagt at fráboða Styrelsen for Patientsikkerhed, um myndugleikin "i et omfang udover det gennemsnitlige har været erstatningspligtige" eftir lógini. Nærri reglur um, hvussu hetta verður staðfest, og hvussu uppgerðin, sum liggur til grund, skal gerast, er ásett í kunngerð, sum skal setast sjálvstøðugt í gildi fyri Føroyar, um lógin verður dagførd.

Av øðrum broytingum kunnu nevnast:
- Privat sjúkrahús, klinikkir og serlæknaviðtalur, sum fáa beinleiðis gjald frá sjúklinginum, uttan um almenna heilsuverkið, skulu sjálvi rinda møgulig endurgjøld, sum verða ásett eftir lógini.
- Broyttar reglur um endurgjald fyri skaða av tannviðgerð.
- Serlæknar, sum virka uttan at hava avtalu við Heilsutrygd, skulu sjálvir rinda fyri útreiðslur til kærumálsviðgerð, sum annars áliggja heilsumyndugleikanum at rinda.
- Markið fyri, nær endurgjald verður útgoldið, verður broytt frá 10.000 kr. til endurgjaldsupphæddina minus 7.300 kr.
- Heilsumyndugleikin (Heilsumálaráðið) fær skyldu til at leggja út fyri endurgjald til sjúkling í teimum førum, ein privatur veitari ikki hevur teknað lógarkravdu tryggingina. Heilsumyndugleikin kann so reisa regresskrav móti privata veitaranum.

Harumframt kann nevnast, at landsstýrismaðurin yngsti, at §§ 64 og 65 í núverandi lóg vóðu strikaðar. Í § 64 eru allar núgaldandi kunngerðir ásettar og í § 65 er ásett umskiftist reglur, í mun til tær reglur, ið vóru galdandi áðrenn kongaliga fyriskipanin, varð sett í gildi 1. januar 2012. Justitsministeriet meinar ikki, at tað er rætt, at strika hesar ásetingarnar grunda á, at tær eru søguligar. Ásetingarnar eru tó ikki ein forðing fyri, at núgaldandi kunngerðir kunnu broytast ella setast úr gildi.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Hesi hava havt uppskotið til ummælis:

**Stovnar undir HMR:**
- Sjúkrahúsverk Føroya
- Heilsutrygd
- Landsapotekarin

**Stjórnarráð:**
- Almannamálaráðið

**Fakfeløg:**
- Læknafelag Føroya
- Serlæknafelag Føroyar
- Kommunulæknafelag Føroya
- Hjálparlæknaráð Føroya
- Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar
- Ergoterapeutfelagið
- Fysioterapeutfelag Føroya
- Ljósmøðrafelag Føroya
- Heilsuhjálparafelag Føroya
- Heilsurøktarafelagið
- Kost- og føðslufelagið
- Bioanalytikarafelagið
- Felagið fyri Yngri læknar
- Radiografar
- Føroyskir Sálarfrøðingar
- Føroya Tannlæknafelag
- Tannrøktarafelagið

**Onnur:**
- Landslæknin
- Kommunufelagið
- Sjúklingaráðið

**Sjúklingafeløg:**

- MEGD
- ADHD felagið
- Alzheimerfelagið
- Autismufelagið
- Cøliakifelag Føroya
- Deyvafelag Føroya
- Diabetesfelag Føroya
- Epilepsifelag Føroya
- Føroya Astma/Allergifelag
- Føroya Blindafelag
- Føroya Psoriasisfelag
- Giktafelag Føroya
- Heilafelagið
- Hoyr
- Javni
- Nýrafelagið
- Parkinsonfelagið
- Sclerosufelagið
- Sinnisbati
- Spastikarafelagið
- Hjartafelagið
- Krabbameinsfelagið
- Stoffskiftisfelagið

## Kapittul 2. Avleiðingar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar fyri land og kommunu

Mett verður ikki, at fyriskipanin fer at hava við sær fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar av týdningi.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Mett verður ikki, at fyriskipanin fer at hava við sær fyrisitingarligar avleiðingar av týdningi. Tó er sannlíkt, at fráboðanarskyldan sambært § 29, stk. 4 og 5 fer at krevja eitt ávíst arbeiði í heilsufyrisitingini og hava samsvarandi kostnað við sær.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.3. Umhvørvisligar avleiðingar

Uppskotið hevur ikki umhvørvisligar avleiðingar við sær.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk økir í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Lógaruppskotið er ikki tengt at millumtjóðasáttmálum, sum Føroyar hava skyldu at fylgja.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Mett verður ikki, at uppskotið er í ósamsvar við tvørgangandi millumtjóðarsáttmálar, harundir Evropeiska mannarættindasáttmálan ella Sáttmála Sameindu Tjóða um rættin hjá einstaklingum, ið bera brek.

### 2.9. Marknaforðingar

Uppskotið elvir ikki til marknaforðingar.

## 2.10 Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Víst verður til hjálagda "bilag 1" til kongaligu fyriskipanina við almennum og serligum viðmerkingum til lógartekstin. Hetta er skjal 2 til ríkislógartilmælið.

Hjálagda kongaliga fyriskipan verður sett í gildi dagin eftir hon er kunngjørd.

Heilsumálaráðið, tann xx.xx.2020

**Kaj Leo Holm Johannesen**
landsstýrismaður

/

Turid Arge
aðalstjóri

**Fylgiskjøl**

***Skjal 1:*** Uppskot til ”Anordning om ikrafttræden for Færøerne af forskellige love om ændring af lov om klage- og erstatningsadgang inden for sundhedsvæsenet”.

***Skjal 2:*** Viðmerkingar til broytingaruppskotið